**Formula-deildin**

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | NSÍ | 23 | 16 | - | 3 | - | 4 | 41 | 20 | 21 | 51 |
| 2 | B36 | 23 | 14 | - | 7 | - | 2 | 41 | 15 | 26 | 49 |
| 3 | HB | 23 | 13 | - | 3 | - | 7 | 53 | 30 | 23 | 42 |
| 4 | EB/S | 23 | 13 | - | 3 | - | 7 | 39 | 27 | 12 | 42 |
| 5 | GÍ | 23 | 8 | - | 5 | - | 10 | 34 | 45 | -11 | 29 |
| 6 | KÍ | 23 | 8 | - | 4 | - | 11 | 38 | 39 | -1 | 28 |
| 7 | Skála | 23 | 8 | - | 4 | - | 11 | 24 | 34 | -10 | 28 |
| 8 | B71 | 23 | 7 | - | 5 | - | 11 | 34 | 42 | -8 | 26 |
| 9 | AB | 23 | 4 | - | 5 | - | 14 | 28 | 46 | -18 | 17 |
| 10 | VB/S | 23 | 2 | - | 5 | - | 16 | 23 | 57 | -34 | 11 |

**1. deild menn**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B68 | 24 | 21 | - | 2 | - | 1 | 71 | 16 | 55 | 65 |
| 2 | ÍF | 24 | 16 | - | 4 | - | 4 | 70 | 21 | 49 | 52 |
| 3 | FSV04 | 24 | 15 | - | 3 | - | 6 | 43 | 32 | 11 | 48 |
| 4 | LÍF | 24 | 13 | - | 1 | - | 10 | 62 | 40 | 22 | 40 |
| 5 | TB | 24 | 12 | - | 4 | - | 8 | 49 | 26 | 23 | 40 |
| 6 | HB | 24 | 9 | - | 2 | - | 13 | 35 | 47 | -12 | 29 |
| 7 | NSÍ | 24 | 9 | - | 1 | - | 14 | 42 | 61 | -19 | 28 |
| 8 | SÍ | 24 | 6 | - | 3 | - | 15 | 31 | 60 | -29 | 21 |
| 9 | KÍ | 24 | 5 | - | 2 | - | 17 | 26 | 62 | -36 | 17 |
| 10 | B36 | 24 | 2 | - | 2 | - | 20 | 19 | 83 | -64 | 8 |




*Tvær ferðir hevur HB vitjað í Runavík í ár. Í landskappingini gjørdist talan um útisigur, meðan vespurnar drógu longra stráðið í landskappingardystinum í vár*

umstøðum vildi ein javnleikur í Runavík helst verið eitt gott úrslit. Men Rógvi staðfestir, at vit ikki skulu rokna við at síggja eitt HB-lið, sum legst aftur at verja.

- Eg haldi, at vit í verandi støðu kunnu spæla rættiliga frítt, tí nakað veruligt trýst er ikki á okkum. Og hartil eru tað fyrst og fremst trý stig, sum vit hava tørv á, skulu vit halda okkum á javnar við EB/Streym. Tí rokni eg við, at vit fara at royna at spæla tað, sum vit eru bestir til. Nevnliga framrættaðan fótbólt, har vit fara eftir sigrinum, sigur Rógvi.

# NSÍ longt samstarvið við Jóhan

**Í gjárkvøldið skrivaðu oddaliðið í Formuladeildini, NSÍ, og venjarin, Jóhan Nielsen, undir nýggjan sáttmála sum ger, at Jóhan aftur komandi ár skal venja besta liðið hjá NSÍ**

**FÓTBÓLTUR**
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



Tað hevur gingið strúkandi hjá NSÍ í formuladeildini í fótbólti, og nú tað bert eru 12 stig eftir at spæla um, liggur NSÍ á fremsta plássi í formuladeildini. Tí eru útlitini sjálvsagt rættiliga góð, at vespurnar úr Runavík skulu tryggja sær fyrsta meistaraheitið í søgu felagsins.

Í gjárkvøldið bleiv eisini greitt, at tað verður sami maður sum skal standa á odda fyri NSÍ komandi kappingarár. Tá longdi felagið nevniliga um sáttmálan við Jóhan Nielsen. Hetta veit heimasíðan hjá felagnum, www.nsi.fo, at siga.

- Øll kendu til dygdirnar hjá Jóhan Nielsen, áðrenn hann kom til NSÍ, og úrslitini í felagnm hava eisini talað fyri seg. Longu fyrsta árið hevur tað eydnast honum at fingið formulaliðið hjá okkum heilt fram í oddin, og tí var tað einki ivamál hjá okkum at leingja um sáttmálan, nú vit fingu møguleika til tess, sigur formaðurin í NSÍ, Dánial Petur Hansen.

Fyrr í vikuni megnaðu unglingarnir hjá NSÍ at vinna greipuna uttan at seta eitt tað einasta stig til í kappingini, og tí eru framtíðarútlitini hjá felagnum eisini sera góð.

- Sum sagt, so fegnast vit sjálvandi um, at Jóhan longu fyrsta árið sum venjari hevur fingið formulaliðið hjá felagnum at verða partur av oddastríðnum. Jóhan er tó eisini ein venjari, sum arbeiðir málrættað við sínum hópi yvir fleiri ár, og tí verður tað sjálvsagt spennandi at fylgja við menningini av okkara ungu leikarum, harav fleiri longu hava vunnið sær pláss á formulaliðnum, sigur Dánial Petur Hansen at enda.

# Við – ikki við

Skaddir: Jákup á Borg (lærkrikin)
Ivasamir: Rógvi Jacobsen (fótskaði)

Allir mans tøkir

Skaddir: Arnhold Berg (knæskaði) og Pauli G. Hansen (fótskaði)

Leikbann: Høgni Madsen og Símun Joensen

Leikbann: Dánjal Jóhan Joensen, Jón Krosslá og Teitur Tausen

# vur gingist

| | 07 | '06 | 06 | 05 | 05 | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| B36-AB | 4-1 | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 1-0-0 | 4-1 |
| KÍ-EB/S | 1-2 | 1-4 | - | 2-4 | 0-1 | 2-2 | 4-1 | 3-1 | 0-4 | - | - | - | - | 2-1-5 | 13-19 |
| NSÍ-HB | 1-0 | 1-3 | - | 2-1 | - | 2-2 | 2-2 | 0-2 | 2-1 | 1-3 | 0-2 | 0-4 | 1-1 | 3-3-5 | 12-21 |
| B71-GÍ | 1-1 | - | - | - | - | - | - | - | 0-7 | 2-2 | 2-5 | - | 0-1 | 0-2-3 | 5-16 |
| VB/S-Skála | 0-1 | 0-4 | - | 1-5 | - | 0-0 | 2-0 | 0-0 | - | - | - | - | - | 1-2-3 | 3-10 |